**Hoyringsskriv viðvíkjandi ætlanini at skerja veiðidagar eftir sjófugli**

Góði Høgni Hoydal og Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Vit, limir í Veiði og Skjótifelag Føroya ynskja hervið at seta fram okkara sjónarmið og áheitanir í sambandi við ætlanini hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, at skerja veiðitíðina eftir svartfugli, d.s  Lomvigu, álku og lunda.

## Innleiðing:

Felagið vil við hesum, takka fyri at sleppa til orðanna, og vilja vit í hesi hoyring vísa á viðurskifti, ið hava týdning fyri veiðina eftir svartfugli.

Eingin veiðimaður ynskir at oyða nakran stovn, tí er tað umráðandi fyri okkum, at vísa á væl grundaðar vísindaligar staðfestingar, og okkara eygleiðingar frá okkara nærumhvørvi.

Veiðimentanin í Føroyum, er ikki bara ein partur av okkara mentanararvi, men við verandi veiðiáseting, eisini ein burðardyggur siður, sum er framdur í fleiri ættarlið. Ein siður, ið vit meta, eigur at halda áfram, tó við ávísum smærri tillagingum.

## Lomviga, álka og lundi

Yvir longri tíð eru teljingar, skrásetingar og alheims akademiskar greinar skrivaðar, um lomvigu, álku og lunda. Harvið, er vitanin um omanfyri nevndu fuglasløg góð.

Tað finnast altjóða stovnar, sum savna saman granskingarúrslit, og hava harvið vitan til at gera ymiskar niðurstøður, millum annað um fugl, stovnsstødd á fugli og so framvegis.

Her endurgeva vit staðfestingar um standin á lomviga, álku og lunda á viðurkendu heimasíðuni hjá The International Union for Conservation of Nature, hetta eru almenn tøl.

***<u>Soleiðis skrivar UICN um Lomviga:</u>***




*View on www.iucnredlist.org*

# Taxonomy

| Kingdom | Phylum | Class | Order | Family |
|---|---|---|---|---|
| Animalia | Chordata | Aves | Charadriiformes | Alcidae |

**Taxon Name:** *Uria aalge* (Pontoppidan, 1763)

**Regional Assessments:**

- Europe

**Common Name(s):**

- English: Common Murre, Common Murre, Guillemot
- French: Guillemot de Troïl

**Taxonomic Source(s):**

Cramp, S. and Simmons, K.E.L. (eds). 1977-1994. *Handbook of the birds of Europe, the Middle East and Africa. The birds of the western Palearctic*. Oxford University Press, Oxford.

# Assessment Information

**Red List Category & Criteria:** Least Concern ver 3.1

**Year Published:** 2018

**Date Assessed:** August 7, 2018

**Justification:**

This species has an extremely large range, and hence does not approach the thresholds for Vulnerable under the range size criterion (Extent of Occurrence <20,000 km² combined with a declining or fluctuating range size, habitat extent/quality, or population size and a small number of locations or severe fragmentation). The population trend appears to be increasing, and hence the species does not approach the thresholds for Vulnerable under the population trend criterion (>30% decline over ten years or three generations). The population size is extremely large, and hence does not approach the thresholds for Vulnerable under the population size criterion (<10,000 mature individuals with a continuing decline estimated to be >10% in ten years or three generations, or with a specified population structure). For these reasons the species is evaluated as Least Concern.

## *Soleiðis skrivar UICN um Lunda:*




CURRENT POPULATION TREND

**Decreasing**

NUMBER OF MATURE INDIVIDUALS

**12,000,000-14,000,000**

POPULATION SEVERELY FRAGMENTED

No

CONTINUING DECLINE OF MATURE INDIVIDUALS

Yes

**Population in detail**

EXTREME FLUCTUATIONS

No

NO. OF SUBPOPULATIONS

CONTINUING DECLINE IN SUBPOPULATIONS

Unknown

EXTREME FLUCTUATIONS IN SUBPOPULATIONS

No

ALL INDIVIDUALS IN ONE SUBPOPULATION

No

NO. OF INDIVIDUALS IN LARGEST SUBPOPULATION

DESCRIPTION

The European population is estimated to be 4,770,000-5,780,000 pairs, which equates to 9,550,000-11,600,000 mature individuals (BirdLife International 2015). The global population size is estimated at 12–14 million mature individuals (Harris and Wanless 2011; Berglund and Hentati-Sundberg 2014).

**Trend Justification:** The population size in Europe is estimated and projected to decrease by 50-79% during 2000-2065 (three generations) (BirdLife International 2015). Europe holds >90% of the global population, so the projected declines in Europe are globally significant. The overall trend of the West Atlantic population is unknown (Berglund and Hentati-Sundberg 2014), and it is very tentatively suspected that overall declines may fall in the range 30-49% over three generations. Populations are suspected to be declining rapidly through the combined impact of predation by invasive species, pollution, food shortages caused by the depletion of fisheries and adult mortality in fishing nets.

## *Soleiðis skrivar UICN um Álku*



JUSTIFICATION

This species has an extremely large range, and hence does not approach the thresholds for Vulnerable under the range size criterion (Extent of Occurrence <20,000 $km^2$ combined with a declining or fluctuating range size, habitat extent/quality, or population size and a small number of locations or severe fragmentation). The population size is very large, and hence does not approach the thresholds for Vulnerable under the population size criterion (<10,000 mature individuals with a continuing decline estimated to be >10% in ten years or three generations, or with a specified population structure). The population trend appears to be increasing, and hence the species does not approach the thresholds for Vulnerable under the population trend criterion (>30% decline over ten years or three generations). For these reasons the species is evaluated as Least Concern.

## Sjóðfuglurin í Føroyum:

Okkum kunnugt, er tað Havstovan, sum varar av sjóðfuglinum í Føroyu.  Og eru tað almenn tøl frá Havstovuni, sum vit brúka í hesum teigi, fyri at lýsa støðuna av lomviga, álku og lunda í Føroyum.

Á síni heimasíðu hevur Havstovan hesi almennu tølini (sí mynd).

> Havstovan ger á hvørjum ári ymsar kanningar av sjófugli, men lang tíð er runnin síðani tann seinasta umfatandi teljingin varð gjørd, har øll sjófuglasløgini vórðu tald (sí talvu niðanfyri). Aðrar kanningar, ið verða gjørdar meira javnan, eru millum annað kanningar við merkjum. Hetta er fyri at finna útav, hvussu fuglurin ferðast. Eisini verða teljingar gjørdar av ávísum fuglum í útvaldum fuglabjørgum.




Á hesi talvu staðfestir Havstovan, at tað eru 1.65 milliónir lundar, 690 túsund ritir, 525 túsund lomvigur og 13.500 álkur í Føroyum.

Bæði ringmerkingar og fylgisveina sendarar vísa, at føroyski svartfuglurin leitar sær langt út um føroyskt sjóðøkið, eftir at pisan er floygd.

**Ferðamynstur hjá okkara svartfugli:**

Niðanfyri er mynd av ferðamynstrinum hjá føroyska svartfuglinum, ið er tikin úr grein, ið høgt virðismettir granskarar á Havstovuni fyri kortum hava skrivða og sent til altjóða tíðarrit at úttgeva. Greinin er kortini ikki útgivin enn.




Figure 3 Average non-breeding distribution of kittiwakes (2009-2023), puffins (2014-2023) and guillemots (2015-2021) breeding on the Faroe Islands, segregated into (**A**) autumn (August-October), **(B)** winter (November-January) and (**C**) spring (February-April). The maps depict probability density functions overlaid all available data points (see Table 1). The polygons displayed represent, with increasing color intensity, the 25%, 50% and 75% probability contours of these functions. All maps were produced by courtesy of SEATRACK (https://seapop.no/en/seatrack/).

Greinin vísir, at nógv tann stórsti parturin av lomviga, lunda og ritu, leitar sær arðar leiðir í tíðini, loyvi er at skjóta hesar fuglar. Viðmerkjast skal, at tað einans eru settir sendarar á 14 lomvigar, tísskil er myndin fyri lomvigan lutfalsliga lítið sigandi, tó vísir hon rættuliga greitt at føroyska lomvigan, ikki er í føroyskum sjógvi í veiðitíðini.

Hyggja vit hinvegin í bókina ”Færøsk Trækfugleatlas», ið millum onnur er skrivað av Jens Kjeld og Dorete Bloch. So finna vit fram til drúgvu umrøðuna av umfatandi ringmerking í Føroyum, har 6.357 lomvigar blivu merktir aftur í 70’unum.

Av teimum 6.357 merktu fuglunum, eru 802 ringar komnir inn aftur. Nógv tann stórsti parturin av afturkomnu ringunum, stavaðu frá druknaðum lomvigum í gørnum, uttanfyri Norsku strondina. Einans 3 ringar komu aftur av veiddum fugli í Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1. oktobur til 20 januar.

Út frá hesum myndum kann staðfestast, at Føroyskur svartfuglur er rættuliga langt úr byrsumálið, í veiðitíðini frá 01. oktobur til 20. januar.

## Burðardygd:

Havstovan staðfestir á heimasíðu síni (SÍ mynd): ”at teir ikki kunnu siga, at veiðan eftir svartfugli er burðardygg. Orsøkin til tað er, at Havstovan ikki hevur neyvar stovnsmetingar av sjóð/svartfugli kring alt landið og siga eisini, at stovnurin ikki hevur nakrar skrásetingar av veiðihagtølum.

> Sjófuglaveiða til matna hevur helst altíð verið siðvenja í Føroyum og er tað framhaldandi. Men hóast fleiri sjófuglastovnar leingi hava verið minkandi í tali, hevur mann í Føroyum einans sett smávegis tiltøk í verk fyri at verja sjófuglin. Um Havstovan skal koma við røttum tilmælum um, hvussu nógv kann veiðast av sjófugli, er neyðugt at hava fuglateljingar javnan, og eisini er neyðugt at skráseta veiguhagtøl. Sum nú er, er innsavningin av hagtølum ikki nøktandi, hvørki viðvíkjandi fuglateljingum ella veiðuhagtølum, og tí kunnu vit ikki vita, hvussu sjófuglastovnarnir tola veiðutrýstið. Tað ber tí ikki til at siga, at sjófuglaveiðan er burðardygg.

Vit meta at hendan útsøgnin frá Havstovuni er betri ósøgd, tí grunda av manglandi vitan, kann Havstovan heldur ikki við vissu siga, at veiðan eftir svartfugli er óburðadygg.

Og harumframt, so sær Havstovan ikki heildina, sum vit vísa á omanfyri, sum er alneyðugt fyri at rættvísgerða, at vit við reinari samvitsku kunna veiða fugl.

Í nógv ár hevur tað verði gitt og illgitt um, hvussu sjóðfugurin í føroyum hevur tað. Føroyingar hava skrivað vísindaligar greinar, millum annað ym hvussu føði ávirkar svartfuglin o.s.fr.

Somuleiðis eru nógvar eygleiðingar gjørdar, av bæði granskarum, veiðifólki og fuglakønum av svartfuglinum, og javnan blíva sera ógrundaði uppáhald førd fram.

Men hóast hetta, tykjast øll samd um, at fakta um fuglin ikki er uppá pláss, hvørki hvat viðvíkur stovnsmetingum, umhvørvsligu árinum ella veiðu.

Sannleikin er, at við tí vitan, vit í dag hava um føroyska fuglin, er nær um vónleyst at gera sær eina greiða mynd av, hvussu standurin hjá svartfuglinum í Føroyum er.

Okkum kunnugt, so er fyri tað mesta galdandi, at veiðan er burðadygg, tá tað verður veitt um 10% av einum samlaðum stovni, hetta verður umrøtt seinni í skrivinum.

## Høvdin á Skúvoy:

Myndin niðanfyri (sí myndi) er tikin av heimasíðuni hjá Havstovuni. Hon vísir teljingarnar av sjóðfugli á høvdanum í Skúgvi, á hvørjum árið í tíðarskeiðinum 1975 til 2023 av lomviga, ritu og havhesti.




Vit viðurkenna, at samlaða talið av lomviga í Høvdanum minkar nógv frá 1972 til 1990. Men frá 1990 og fram til 2023, hendir tað seg fleiri ferðir, at tað verða tald á leið 3.000 pør av lomviga í Høvdanum, tó at tað til tíðir eru útsving.

Síggjast kann eisini, at ritan hevur verði í støðugum vøkstri í Høvdanum, tó at 2023 ikki royndist so væl eins og undanfarin ár.

Okkara greiða fatan av teljingunum í Høvdanum,  33 árini frá 1990 fram til 2023 er, at lomviga stovnurin liggur støðugur, tó við ávísum útsvingum.

Ritan hevur verði í vøkstri 10 tey síðstu árini síðani 2014.

Veiðifelagið ger vart við, at veiðifólk kring oyggjarnar í mong ár hava gjørt sær eygleiðingar av svartfuglastovninum kring alt landið, og nógv verður práta saman millum veiðifólk. Hetta ger, at veiðifólk hava eina virðismikla vitan, ið sjálvdan, um nakrantíð,  verður tikin við, tá metast skal um sjóðfuglastovnarnar.

Mangan er tað ikki samanhangur í millum tað í vísindin sigur, og tað sum veiðifólk staðfesta í bjørgum og sjógvi, og er tað reglan, heldur enn undantakið, at vísindin er alt ov passiv við sínum staðfestingum.

Fyri okkum er tað sera umráðandi at staðfesta, at Høvdin einans umboðar ein lítlan part av øllum búðstøðnum hjá sjóðfugli í Føroyum, tísskil kann henda talva ikki brúkast til meira, enn eina løtumynd á avmarkaðum staðið.

### 3. Mentanararvur og fíggjarligur týdningur:

Veiðan eftir svartfugli er, og hevur til allar tíðir verði ein partur av okkara mentanar- og siðarvi. Sum útgangsstøði meta vit ikki, at nøkur veiða eigur at fara fram, tí tað er mentan og siður, men tí, fyri nógvar bygdir og býðir er veiða ein týdningarmikil kelda til mat. Svartfuglur er partur av einum sunnum og fjølbroyttum kostvana hjá mongum føroyingum.

Vit vilja eisini vísa á, at fuglaveiða sum heild er savnandi og knýtir tøtt bond í bygdum og býðum og millum bygdir og býðir.

Ung og gomul, læra virðismiklan lærdóm frá veiðifólkið um føroyska mentan, um fugla og djóralív sum heild, um okkara náttúru og ikki minnst um, hvussu man á ein skilagóðan hátt kann gagnnýta tilfeingi, ið okkum føroyingum er latið upp í hendi.

Hugtakið «stuttflutt» sum er meira aktuelt nú enn nakrantíð, orsaka av umhvørvisdálking og ovurtstóru prísvørstrunum, á so at siga øllum innfluttum matvørum, fær veruligan týdning, tí veiðan eftir svart fugli krevur ikki meira enn tað, ein sjálvur leggur í tað.

Fyri veiðifólk hevur veiða, sera stóran fíggjarligan týdning. Vit undirstrika, at tað ikki er søla av veiðini sum ger okkum fíggjarliga sterkari. Harafturímóti er tað sparingin av, at tað slepst undan at keypa matvørur til yvirprís – aftrat hesum slepst eisini undan at ríka upp fremmandar útlendskar aktørar, sum fyri ein stóran part eiga matvøruhandlarnar í Føroyum í dag.

Haraftrat, so kann man seta spurnarðartekin við, um tað ið verður keypt til føði í matvøruhandlunum er ein betri og øðrvísi møguleiki, til millum annað fuglin sum vit veiða. Tað er ein alheimstrupulleiki, at heilsustøðan hjá fólki er versna, í takt við, at menniskjaføði er blivin ein alheims handilslýsing.

**Veiðan eftir svartfugli:**

Fyrr í hesum skrivið, hava vit víst á, at uppáhald javnan verður ført fram um, at tað ikki finnast skrásetingar av veiðuhagtølum í Føroyum.

Somuleiðis hava fuglafrøðingar og onnur náttúraverndarfólk javnan ført fram, at tað kemur kapping millum veiðifólkið. Og at veiðifólk við sínum stóru og skjóttgangandi bátum, sigla alt landi runt, og skjóta frá hond í fleiri tíggju túsundatali av svartfugli – uttan at hava nakað sum helst at byggja sínar útsagnir á.

Omanfyri nevndu útsagnir fingu veiði- skilafólk til at bera seg at, og settu sær fyri at mótmæla hesum útsagnum.

Úrsliti av tí arbeiðnum var, at tað til veiðuárið 2022, bleiv framleidd ein heimasíða, har fólk hava møguleika til at skráseta sína fuglaveiðu og annað. (sí leinkju www.fuglaveida.fo).

Á hesi síðu, eru tað gjørdar skrásetingar úr øllum føroyum. Her hava vit eitt hent amboð, at geva okkum eina mynd av, hvussu veiðan eftir svartfugli hevur hátta seg, árini eftir fyrsta skrásetingarár.

Talvurnar niðanfyri vísa samlaðu veiðina av lomvigu, álku og lunda fyri árini 2022, 2023 og 2024 og túratøl fyri hesi ár.

Veiðutøl fyri 2022:




Veiðutøl fyri 2023:



Veiðutøl fyri 2024:




Árið 2024 er ikki liðugt enn, so tað koma helst nakrir túrar afturat, og tað kann verða, at nakrir túrar verða gjørdir, áðrenn veiðutíðin er úti.

Sum vit áður hava nevnt í hesi grein, undir punktinum «bruðardygd», so metist veiða at verða burðadygg, um man tekur áleið 10% av samlaða stovninum.

Vit hava eisini víst á undir punktinum, «sjóðfuglinum í Føroyum», at almenna metingin av stovnum á lomviga er 525.000 stk., álku er 13.500 stk. og lunda er 1.65 millión.

Av hesum kunnu vit skjótt staðfesta, at skrásettu veiðitølini fyri ár 2022 og 2023 liggja øll undir markinum, fyri burðardygga veiðu, sum vil siga, at veiða eru burðardygg.

Kortini er eitt stórt MEN í hesum samanhanginum. Tí sum vit hava víst á undir teiginum «sjóðfuglurin í Føroyum» ferðast nógv tann stórsti parturin av «Føroyska» fuglinum í onnur lond, at búðleikast í tíðarskeiðinum, tað er loyvi at skjóta hann.

Sostatt kunna vit vælgrunda staðfesta, at tað bara er ein viðfáningur av «Føroyskum» fugli, sum verður skotin í veiðitíðini undir Føroyum. Talan er um útlendskan stovn, ið er partur av einum lutfalsliga stórum stovni, í mun til føroyska stovnin.

Vit hava undir punktinum «Lomviga, álka og lundi» víst á samlaða stovnstalið fyri hesi fuglasløg, og at ongin av hesum fuglasløgum,m eru skrásett sum hótt fuglasløg.

Harvið kunnu vit, við tí vitan, staðfesta, at veiðan eftir lomviga, álku og lunda er burðardygg. Og tíðarskeiðið, har tað er loyvið at skjóta svartfugl, á ongan hátt skerjir hvørki føroysku, ella útlendsku fuglastovnar.

**Rætturin at veiða av okkara náttúrutilfeingi:**

Vit meta tað sum ein ófrávíkiligan rætt, at gagn nýta tilfeingi, ið okkum Føroyingum er givið. Hetta er í trá við eina føroyska visión um at liva av nærumhvørvinum, so vítt sum møguligt, fyri at lætta um co2 útláti.

Fyri okkum veiðifólk, er tað ein líka stór sjálvfylgja, at fara at skjóta sær nakrar lomvigar, álkur og lundar til húsbrúk, sum at fara út á fjørðin at fiska sær kók til húsbrúk.

Tað tykist fyri okkum, púra óhugsandi, at løgtingi, landstýrisfólk og fiskifrøðingar fara at mæla til, at tað einans skal verða lógligt at fiska tosk- sum leingi hevur verið hóttur - til húsbrúk bara 1 mánaða um árið.

Tí gjørdust vit veiðifólk, bæði bilsin og ørkymlaði, tá tað sum snarljós av bláum himli, bleiv melda út, at veiðitíðin eftir svartfugli skuldi skerjast. Tí sum vit hava víst á, so eru tað ikki veiðidagarnir, har tað er loyvi at veiða, sum hóttir nakran stovn.

Tað ørkymlar okkum almikið, at Ramsar nevndirnar, hava fingið so stórt vald, at teir av sínum eintingum, fáa landstýrismannin til at leggja eitt - fyri okkum eitt so kollveltandi uppskot - fram, púra ógrunda og uttan nakað vísindaligt tilfar, at byggja hetta uppskotið á.

Tað er umráðandi, at hava heimsmálini hjá ST fyri burðardygga menning í huga. Talan er um eina greiða leiðbeining um, hvussu vit kunnu tryggja eina bjarta framtíð fyri okkara land, og komandi ættarlið.

Vit liva í eini tíð, har umhvørvisligar avbjóðingar og aðrar broytingar, noyða okkum at taka ábyrgd, og virka fyri eini burðardyggari og framskygnari tilgongd.

Fyrst og fremst minnir mál 14, "Lívið í havinum" okkum á týdningin, at varðveita okkara havumhvørvi. Havið er avgerandi fyri lívfrøðiliga fjølbroytni, og fyri okkum veiðifólk, eisini týðandi fyri búskapin og menniskjaliga vælfer.

Havið er ein kelda til tilfeingi, ið á mangan hátt, og í øldir hevur átt lívið í okkum føroyingum.

Við at skilagott varðveita, verja og gagnnýta okkara havumhvørvi, sum vit fyrr í hesum skrivið hava víst á at vit gera. Tryggja vit, at havið framhaldandi kann veita okkum fugl, og annað tilfeingi. Hetta fer somuleiðis stuðla undir, eina burðardygga framtíð fyri komandi ættarlið.

Somuleiðis leggur mál 15, "Lívið á landi," dent á týdningin av, at varðveita lívfrøðiligt fjølbroytni. Eitt ríkt náttúrufjølbroytni er grundarsteinurin fyri okkara heilsu.

Tað er okkara ábyrgd at tryggja, at vit ikki skerja fjølbroytni. Ein fjølbroytt náttúra er í sær sjálvum serstøk, men hon er eisini grundarsteinurin fyri okkara egna trivnað, og lívsgóðsku

Mál 13, "Veðurlagsátak," leggur dent á alneyðuga arbeiðið, við at taka tøk, fyri at bøta um veðurlagsbroytingarnar.

Veðurlagsbroytingar eru ein av størstu avbjóðingunum, ið samfelagið stendur yvir fyri í dag, og tær kunna hava álvarsligar avleiðingar, fyri bæði menniskju og náttúru.

Fyri okkum í veiðifelagnum er tað umráðandi at vísa á, at veiða í nærumhvørvinum, sum er grundað á staðbundnar og burðardyggar siðir, vísir umhvørvislig skynsemi. Við at gagnnýta tilfeingi í

nærumhvørvinum, eru vit við til at minka um flutningsdálkan, og samstundis verða við til at stuðla undir, at fólk í bygd og býi hava størri fíggjarligt rásarrúm, av vistfrøðiligum stuttfluttum ókeypis matvørum.

Vísandi til FN Montreal sáttmálan ið Føroyar hevur bundið seg til, vísir stk 21, 22, samt 23. Metir Veiðifelag Føroya ikki at uppskotið um skerjing av veiðudøgum, lýkur krøvini til at gera ætlaðu broytingar í fuglaveiðilógini.  Brot á sáttmálan, kann í hesum sambandi beinast víðari til dómstólin í Haag.

Stk 21. Ensure that the best available data, information and knowledge are accessible to decision makers,

Practitioners and the public to guide effective and equitable governance, integrated and participatory

Management of biodiversity, and to strengthen communication, awareness-raising, education, monitoring,

Research and knowledge management and, also in this context, traditional knowledge, innovations, practices

And technologies of indigenous peoples and local communities should only be accessed with their free,

Prior and informed consent,'4 in accordance with national legislation.

Stk 22.  Ensure the full, equitable, inclusive, effective and gender-responsive representation and participation in

Decision-making, and access to justice and information related to biodiversity by indigenous peoples and

Local communities, respecting their cultures and their rights over lands, territories, resources, and traditional

Knowledge, as well as by women and girls, children and youth, and persons with disabilities and ensure the

Full protection of environmental human rights defenders.

Stk 23.  Ensure gender equality in the implementation of the Framework through a gender-responsive approach,

Where all women and girls have equal opportunity and capacity to contribute to the three objectives of the

Convention, including by recognizing their equal rights and access to land and natural resources and their

Full, equitable, meaningful and informed participation and leadership at all levels of action, engagement,

Policy and decision-making related to biodiversity.

Veiðifelag Føroya metir sostatt ikki, at landstýrismaðurin hevur heimild til at gera broytinganir í fuglaveiðulógini vísandi til manglandi kunning o.a sambært FN sáttmálanum.

### Uppskotið hjá landstýrismanninum.

Hagartil hava vit einans umrøtt lomvigu, álku og lunda. Men í uppskotinum hjá Landstýrismanninum verður rita og skarvur eisini umrødd.

Almennu tølini fyri ritu vísa, at tað eru 690.000 fuglar í føroyum.  Og tølini frá Høvdanum hava víst eina lítla afturgond av fuglum, síðstu árini.

Hóast tað ikki er skjalfest, kenna vit í Veiðiðfelagnum okkum sannførd um, at tað er ein ógvuliga avmarka veiða eftir ritu við byrsu í føroyum.

Hóast rita er góður matur og eitt gott íkast til føðiketuna hjá føroyska húsarhaldinum, hava vit sum so onki í móti, at veiðan eftir ritu verður bannað, í bútíðini.

Tað framgongur av tølunum hjá Havstovnuni, at tað eru 4.500 skarvar í føroyum.  Tað er nógv tað lægsta talið av øllum, samanborið við lomviga, álku, lunda og ritu.

Hóast vit taka undir við at leingja veiðutíðina eftir skarvi, so undrast vit á, at man ynskir at leingja veiðutíðina eftir skarvi – enntá við tí grundgeving «fyri at gera tað nemmari at umsita». Í lógini stendur púra greitt tilskila, hvussu og hvat er loyvi at veiða, tísskil er ongin orsøk at taka skarvin við í hetta lógaruppskotið.

Vut undrast stórliga á, at landstýrismaðurin ætlar at gera ógvusligar skerjingar í veiðitíðini á lutfalsliga stórum stovnum, fyri síðani at økja um veiðitíðina av einum lutfalsliga lítlum stovni. Tað stendur í stórari andsøgn við andan í uppskotinum, ið er at verja fuglin.

Um vit síggja stóru myndina av tí vit hava skrivað í hesum hoyringsskrivinum, so stendur tað klárt, at hetta uppskotið hjá landstýrismanninum kemur ikki at hava nakra sum helst ávirkan, á føroysku lomvigu, álku, lunda og ritu stovnarnar, sum annars var ætlanin við uppskotinum. Og við at leingja veiðitíðina eftir skarvi, er vandi fyri, at man ger meiri skaða enn gagn, við at samtykkja hetta uppskotið.

Fyri okkum er tað umráðandi at gera greitt, at vetrarveiðan eftir svartfugli, er mett sum havveiða. Tað at landstýrismaðurin velur, at taka taka oktobur mánaðin úr núverandi lóggávu, má metast sum óðamannaverk  og vandafullur sjóðmannskapur. Avleiðingin verður, at landstýrismaðurin noyðir smábátarnar at loysa í ivaveðrið, og leggur upp til, at veiðifólk fara at taka óráð fyri, í novembur og desembur. Sum ofta eru ringastu mánaðirnir hvat veður viðvíkur, fyri at vinna sær til dagsinsuppihald av burðadygga, vistfrøðiliga og heilsugóðu føðini, sum fuglurin er.

Sum heild meta vit í Veiðifelganum, at uppskotið hjá Landstýrismanninum um broyting í veiðitíðini, er ógvuliga illa frágingið, og ber brá av persónligum áhugamálum hjá limum í nevndini fyri Ramsøkir.

## Okkara ískoytið til uppskotið

Mynduleikarnir eiga til eina og hvørja tíð, at síggja Veiðufelagið sum ein týdningarmiklan viðspælara, eins og Veiðifelagið eigur at verða ein konstruktivur viðspælari, hjá mynduleikunum. Við hesum í huga, loyva vit okkum at bera fram nakrar hugsanir, ið vit kunna taka undir við, til frama fyri okkum og fæ.

Vit kunnu taka undir við, at friða lundapisur í Oktobur, tá vit ikki kenna upprunan, lata vit ivan koma henni tilgòðar. Tó so, at lundi ið er merktur uttanlanda, er veiddur í oktober.

Veiðifelagið leggur ynski fram um, at veiðitøl verða skrásett á dátagrunni, sum veiðufelagið varar av. Hetta fyri í mest møguligan mun, spara almennu Føroyar fyri óneyðugan kostnað, í mun til, um Havstovan skal umsita dátugrunnin. Veiðifelagið hevur longu atgongd til skrásetingargrunn.

Samstundis við, at vit ynskja at veiða verður skrásett, so má og skal tað ikki sektast við bót, um veiða av eini hvørjari orsøk ikki verður skrásett. Vit  undirstrika, at tað ikki er eitt lógarbrot, at veiða sær sína egnu føði, og tað má tað ongantíð blíva til. (Fyri at draga paralellir so skráseta frítíðarfiskarar ikki sína veiðu.)

Veiðifelagið heitir staðiliga á landsmyndulleikarnir um, at skipa soleiðis fyri, at tað verður eitt munandi størri fatan millum frøðingar og veiðifólk. Soleiðis at allir tættir, sum kunna gagna fólk og fæ, verða lýstir so væl sum tilber ,og á tann hátt fáa vísund og veiðu at ganga hond í hond, sum ST Montreal sáttmálin leggur upp til.

Tildømis eru tað fleiri privatpersónar sum eru áhugaðir at taka stór tøk, við millum annað við at gera teljingar, at týna rottu í bjørgnunum, at merkja og skráseta fugl og so framvegis. Hetta verður sum er, nokta okkum av almennu mynduleikunum.

Vit eru eisini sinnaði at arbeiða fyri, at almenningurin fær eitt størri vitunargrundarlag um veiðiframferðarháttin. Her kann til dømis nevnast, at ein møgulleiki kundi verði, at loyvi til at skjóta fugl, verða útskrivaði til bátar.

Útgangsstøði eigur at verða, at bátar upp til eina ávísa stødd, tað kundi verði 30 føtur, fáa loyvi at skjóta, um teir søkja um tað. Og at stórir útróðrar bátar og skip, ikki fáa útflýggja loyvið at skjóta. Ein slík avmarking, hevði avmarkað veiðutrýstið, tí veðrið um veturin er stundum ein forðing hjá smábátnum fyri, at man kann fara at skjóta.

Somuleiðis kunna vit taka undir við, at eitt mark verður sett á, fyri hvussu nógvar byrsur kunna verða í hvørjum báti. Eitt gott útgangsstøði meta vit vera, at tað kunnu verða tvey fólk umborð á hvørjum báti, sum kunnu skjóta við hvør sínari byrsu, og ein gest. Loyvi má verða til, at hava eina eyka byrsu afturat í bátinum, um so er, at onnur byrsan skuldi fingið eitt brek.  Ein tílík avmarking, hevði somuleiðis verði við til at avmarkað veiðitrýstið á vetrarfugl.

Veiðifelagið gongur høgt uppí, at trygdin er í hásæt,i tá fólk eru á veiðuferð. Tí vilja vit fegin verða við til, at senda áminningar út til veiðifólk um, at tryggja at reiðskapurin er í lagi áðrenn farið verður avstað. Tað kundi til dømis verði, at vit heita á fólk um, at kannað veður, vind og rák áðrenn fari verður avstað,. Tryggja at bjarginarútgerðin í bátinum er í lagi, og so framvegis.

## Samanumtøka:

Vit hava omanfyri víst á:

- At lomviga, álka og lundi, ikki eru hótt djórasløg.

- At lomvigu, álku og lunda stovnurin hevur síðstu 30 árini verið støðugur.

- At grundgevingin fyri at broytal lógina, er tikin á alt ov grunnum, fyri ikki at siga ongum grundarlagið.

- At nógv tann stórsti parturin av lomvigu, álku og lunda, sum verður skotiní Føroyum, ikki er av føroyska stovninum.

- At veiðan eftir svartfugli er burðardygg.

- At lógarbroytingin ikki kemur at verja fuglin, soleiðis sum verður lagt upp til í lógarbroytingini.

- At veiðan eftir svartfugli hevur stóran mentanarligan, sosialan og fíggjarligan týdning fyri føroyingar.

- At vit vilja mæla til, ikki at broyta lógina soleiðis sum er lagt upp til.

- At seta í verk fullkomið veiðibann í oktobur, fyri at veiða lundapisur.

- At veiða eftir lomviga, áku og lunda, verður skrásett í dátagrunni hjá Veiðifelagnum.

- At manglandi skráseting ikki verður sekta við bót, men fyrst við munnligari átalu, síðan skriftligari átalu, og til síðst við sømiligari revsing. Tað kundi verið, at fongur og byrsa verða afturhildin.

**<u>Endi</u>**

Við okkara eygleiðingum, vitan og royndum, saman við tølunum hjá Havstovuni, er tað okkara greiða sannføring, at veiðan eftir svartfugli soleiðis sum vit kenna hana í dag, er burðadygg.

Vit vilja við hesum staðiliga heita á avvarandi myndulleikar, at koma í samskifti við okkum veiðifólk og fuglafrøðingar, fyri at tryggja at allar avgerðir, ið skerja okkara veiðirætt eru so væl grundaðar sum møguligt. Sum sáttmálin eisini leggur upp til.

Tað er okkara vón, at okkara hoyringsskriv, verður eitt gott ískoyti til viðgerðina av hesum málinum. Sum vónandi førir til (fyri okkara viðkomandi) eina jaliga endaliga avger.

Vit takka fyri møguleikan, at seta fram okkara sjónarmið, og síggja fram til eitt konstruktivt samskifti.

6. **Vísindalig eftirlit:** Við at samstarva við granskarar, kunnu veiðimenn geva sítt íkast til dátusavnan, og eftirlit við fuglastovnum. Sum er avgerandi fyri at skilja vistfrøðiligar broytingar, og tillaga umsitingarætlanir. Somuleiðis at mynda føroyska matkovan í framtíðini, sambært ímyndini hjá landsstýrinum um, at gera

Føroyar meira sjálvstøðugt, hvat viðvíkur matvøru. Og hugtakið um, stuttflutta, vistfrøðiliga matvøru, og framleiðslu í nærumhvørvinum.

Hvannasund 13/01-2025